

*Væl av fólki úr allari Sandoynni og aðrastaðni frá vóru til móttøkuna leygardagin.*

# Einki at bíða við

**Leygardagin var stórt hátíðarhald í Skopun, tá nýggi barnagarðurin varð tikin í nýtslu. Longu mánadagin var hann fullur av børnum, og í vikuni eru fleiri komin aftrat.**

DAGSTOVNUR
*Snorri Brend*
*Myndir: Petur Poulsen*

**Skopun:** - Hetta er ein góður barnagarður. Her er snøgt sagt alt sum vit kunnu ynskja okkum!

Soleiðis tekur leiðarin, Fríða Eystberg Johannesen til, nú bygdin hevur fingið sín fyrsta dagstovn.

- Og so havi eg eisini sera góð starvsfólk aftrat mær - og nógvar pedagogar, leggur hon aftrat.

Hesi starvsfólkini løgdu til brots beinanvegin mánamorgunin, tá stovnurin varð tikin í nýtslu.

Mánadagin vóru tey 42 børn í tali, og í vikuni eru komin fimm børn aftrat í frítíðarskúlan.

Íalt eru børnini í frítíðarskúlanum 9 í tali, meðan restin er í vøggustovu ella barnagarði.

Hesi húsast í einari stovu fyri børnini í vøggustovuni, meðan børnini í barnagarðsaldri hava tvær.




*Borgarstjórin í Skopun, Gerhard Lognberg og Fríða Eystberg Johannesen kunnu verða fegin, nú barnagarðurin er latin upp*

### Rímiligt gjald

Frammanundan hevur dagrøkt verið í Skopun, men nú er altso "Barnagarðurin í Gerðinum" sum hann kallast, komin ístaðin.

Tá ein hevur dagrøkt gjalda foreldrini minni fyri hvørt barnið, og nú dagstovnurin kom hevur ein tillagað gjaldið eitt sindur.

Tey hava hugt eftir, hvat tað kostar at hava børn í stovnum aðrastaðni í oynni og sammett tað við Havnina, og út frá hesum er ein so komin fram til ein rættiliga rímiligan prís fyri hvørt barnið.

Í dag kostar tað soleiðis 900 kr. um mánaðin fyri eitt barn í frítíðarskúlanum, 1650 fyri barnið í vøggustovuni og 1550 fyri eitt barn í barnagarðinum.

- Haraftrat gevur kommunan eisini avsláttur fyri systkin, sigur Fríða Eystberg Johannesen.



*Eisini uttanfyri er alt gjørt soleiðis at børnini skulu kunna hugna sær*

## Fyri framtíðina

Líkt er til, at ein frá kommunalari síðu eisini gevur børnunum og framtíðini ans.

Bygdarráðið sjálvt samtykti nevniliga at veita avsláttur fyri systkin í dagstovninum, soleiðis at gjaldið skuldi verða so rímiligt sum gjørligt.

Miðað verður eisini eftir at gera umstøðurnar hjá fólki at búseta seg so góðar sum tilber. Í løtuni fer nevniliga fram ein stór útstykking í bygdini.

Komandi ár lækkar skattaprosentið niður í 23. Barnafrádrátturin er 3500 kr. fyri barnið.

# Bankasøga út í bankabók

BANKASØGA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Føroya Banki gevur í hesum døgum út forkunnuga bók um søguna hjá bankunum í Føroyum, Føroya Banka, sum varð stovnaður í 1906 og Sjóvinnubankanum, sum var stovnaður í 1932. Síðani 1993 hava bankarnirv verið ein banki, Føroya Banki.

Tað eru Jørn Astrup Hansen, fyrrverandi forstjóri bankans og Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur, sum hava skrivað.

Í sambandi við útgávu var móttøka í Tilhaldinum í Havn, sum er gamla høvuðssæti hjá Føroya Banka. Bankin flutti inn í snotuliga bygningin í Tórsgøtu longu nakrar mánaðir eftir stovnan í 1906.

Vit frætta meira um bókini seinni.



*Jørn Astrup Hansen, fyrrverandi forstjóri í Føroya Banka. Myndin er tikin í Tilhaldinum, sum varð bygt til høvuðssæti bankans í 1906*

# Jólamenn á Flúgvarabedingini leygardagin

Leygardagin klokkan 16 skipa Vága Ríðingafelag og Føroya Sparikassi fyri stórum jólatiltaki niðri við Flúgvarabedingina við Sørvágsvatn. Í nøkur ár er jólaskip komið til Sørvágs, men í ár verður stóra jólatiltakið við Flúgvarabedingina.

Jólamenninir búgva úti í Oyrum, og Bassi fer at sigla teir við túrbátinum, Lakeside, norð á Flúgvarabedingina. Eisini koma jólamenn ríðandi á hestbaki. Børnini fáa jólapakka, fýrverk verður at síggja, og í tjaldinum eru kaffi, te, saft og jólabollar at fáa.

Sum vera man, er sangur eisini á skránni. Børn fara at syngja, og Holgar fer at syngja jólaløg eins og løg av nýútkomnu jólafløguni.

Tiltakið er ókeypis, og øll eru vælkomin.



*Jólamenninir í Vágoynni koma í ár av Oyrum og norð á Flúgvarabedingina*